gult16 cyan16 magenta16 svart16



# Fimleikur aftur á skránni

**Heiðursmerki í Fimleiki á Ynos Mon ‘99 (Fimleikur var ikki á Oyggjaleikunum hetta árið, men skipað varð kortini fyri sonevndum Friendly Games í fimleiki millum Jersey, Isle of Man, Ynos Mon, Gibraltar, Áland og Føroyar)**

| | | |
|---|---|---|
| **Gull:** | Helgi W. Ol | bundin kapping, gólv |
| | Helgi W. Olsen | bundin kapping, lop |
| | Helgi W. Olsen | frí kapping, gólv |
| **Silvur:** | Marina Moraitis | bundin kapping, gólv |
| | Liðkapping, kvinnur | gólv |
| | Liðkapping, menn | gólv |
| | Liðkapping, menn | lop |
| | Høgni Øster | frí kapping, gólv |
| | Helgi W. Olsen | frí kapping, ringar |
| | Helgi W. Olsen | frí kapping, lop |
| | Høgni Øster | frí kapping, rekk |
| **Bronsa:** | Liðkapping, kvinnur | lop |
| | Høgni Øster | bundin kapping, lop |



*Henrik B. Bertelsen hevur fleiri ferðir verið í Føroyum, har hann hevur díkt á fimleikararnar, sum nú fara at royna seg á Oyggjaleikunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eftir at eingin fimleikur var á seinastu Oyggjaleikum, er hetta nú aftur á skránni, og vónirnar til føroyska liðið eru góðar**



*Tórarin Holm Petersen*

FIMLEIKUR

*Jákup Mørk*

Ein av ítróttagreinunum, sum Føroyar ofta hava fingið sera góð úrslit í, er fimleikur. Tá Oyggjaleikirnir vórðu hildnir á Gotlandi, var fimleikurin tó ikki á skránni, og sum vera man, var hetta nakað, sum harmaði føroysku luttakararnir nógv.

## Vinarlagið sigraði

Heilt uttan avbjóðingar var fimleikafólkið tó ikki. Føroyingar vóru nevnliga ikki tey einastu, sum harmaðust um, at fimleikurin varð tikin av skránni. Heldur enn at sita hendur í favn, varð tí gjørt av, at ein serstøk kapping skuldi skipast millum tey lond, sum høvdu áhuga í at taka lut í hesum. Friendly Games varð hendan kappingin kallað, og beint undan ólavsøkuni fór føroyska ferðalagið av stað til Ynos Mon, sum hevði átikið sær vertsleiklutin.

Úrslitini, sum føroysku fimleikararnir fingu, vóru eisini framúr. Trý gull-, átta silvur- og eitt bronsumerki var úrtøkan hjá teimum vaksnu, tá alt varð talt saman, og harumframt høvdu juniorarnir eisini vunnið trý heiðursmerki. Ikki minst skaraði Helgi W. Olsen framúr, og stóð hann einsamallur fyri teimum trimum gullmerkjunum, umframt at hann eftir kappingina fekk handað steyp sum besti íðkarin hjá monnum. Eisini stóðu Høgni Øster og Marina Moraitis seg rættiliga væl.

## Rokna við Helga

Júst Helgi er helst eisini størsta vónin hjá føroyingum. Ikki bert grundað á góðu úrslitini frá Ynos Mon, men eisini tí hann síðani hetta hevur gjørt rættiliga nógv við venjingina. Seinastu fýra árini hevur Helgi nevnliga lisið í Danmark undir sonevndu Team-Danmark skipanini, har útbúgvingin verður løgd soleiðis til rættis, at stundirnar at venja eru rættiliga góðar. Sum skilst hevur Helgi vant einar 20 til 25 um vikuna, og vónandi sæst hetta eisini aftur í avrikunum, tá kappast skal.

## Varin venjari

Venjari hjá føroyska liðnum er danin, Henrik B. Bertelsen, sum eisini er í starvi innan menningina av ungum fimleikarum í Danmark.

Hann hevur verið í Føroyum nakrar ferðir, har hann hevur havt venjingar við landsliðnum, og eisini hevur hann verið uttan fyri landoddarnar á venjingarlegu.

Fyri góðum mánaði síðani hittu vit Henrik á máli, og hóast hann ásannaði, at úrslitini hava verið góð áður, so mælti hann tó til varsemi, tá metast skuldi um møguleikan fyri heiðursmerkjum.

- Eg krevji bara, at fimleikararnir gera sítt besta. Meira kann eg ikki krevja, vóru boðini frá venjaranum, sum samstundis legði dent á, at hann einki visti um, hvussu hini londini hava ment seg, síðani kappast varð seinast.

Hvussu er og ikki, so munnu tey fægstu ivast í, at ein hin størsta vónin um føroysk heiðursmerki er hjá fimleikinum, men um tey verða eins nógv í tali, sum tey vóru á Ynos Mon, er kanska meira ivasamt.



*Mia Káradóttir*



*Marjun Persson*



*Anita Knudsen*



*Durita Knudsen*



*Helgi Winther Olsen*



Høgni Andersen



*Pól Esper Hanusson*



*Susan P. Olsen*



*Høgni Øster*



*Magni Jacobsen*



*Marina Maraites*



*Mar it Magnussen*

gult17 cyan17 magenta17 svart17



# Tey frælsu taka seg fram

**Íðkararnir í fræslum ítrótti hava støðugt betrað um úrslit síni, tey árini tey hava tikið lut á Oyggjaleikum**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR

*Jákup Mørk*

Fræslur ítróttur hevur ikki vanliga verið tann ítróttin, sum hevur havt harðastu fastatøkur á føroyingum. Kanska í ávísan mun ávirkað av baldruta veðurlagi okkara, men størsta orsøkin ivaleyst, at umstøðurnaar at íðka frælsan ítrótt ikki hava verið nóg góðar.

Ein lítil bati var tað tó, tá ítróttaøkið við Svangaskarð varð gjørt undan Oyggjaleikunum í 1989, og harumframt hava íðkarar í Havn nú eisini fingið eitt øki við Eysturskúlan, har til ber at venja nakrar av kappingargreinunum, sum eru á skránni. Ikki eins gott, sum tað hevði verið við rennibreyt kring Tórsvøll, men tó frægari enn slettis einki.

## Støðug framgongd

Hóast talan sum nevnt ikki hevur verið um størstu ítróttagreinina her heima, so hava undanfarnu luttøkurnar prógvað, at eisini hjá frælsu ítróttafólkum okkara hevur luttøkan á Oyggjaleikum sýnt seg sum eitt sera hóskiligt forum.

Fyrstu heiðursmerkini komu so líðandi, og so hvørt, sum árini hava liðið, eru hesi vorðin alsamt fleiri í tali. Ikki minst hevur tað hevur verið Heri Ziska, sum hevur roynst væl, men eisini rennararnir hava støðugt tikið seg fram, og fyri tey, sum fylgdu við fyri tveimum árum síðani stendur myndin av eini deyðamóðari Sunnuvá Bjarnastein helst púra klárt í minninum.

Hvussu nógv heiðursmerki talan verður um hesaferð, skal als ikki spáast um á hesum síðum. Vit kunnu tó staðfesta, at so at siga øll tey, sum vunnu heiðursmerki á Gotlandi, eru við aftur hesaferð, og harumframt eru eisini onnur, sum hava tikið seg fram seinastu tíðina, so alt í alt er líkt til, at støðuga menningin av frælsu ítróttini heldur fram. Eisini hóast umstøðurnar í Føroyum als ikki kunnu metast sum nøktandi.



*Heri Ziska*



*Guttorm Sørensen*



*Hallur Holm*



*Heini Hátún*



*Ási Mikkelsen*



*Ingibjørg Poulsen*



*Randi Kúrberg*



*Magni Mouritsen*



*Sunnuva Bjarnastein*

**Heiðursmerki í frælsum ítrótti á Gotlandi ’99**

| | | |
|---|---|---|
| **Gull:** | Heri Ziska | Diskoskast |
| **Silvur:** | Ási Mikkelsen | Longdarlop |
| | Sunnuvá Bjarnastein | 10.000 m |
| | Rigmor N. Joensen | 1/2 marathon |
| | liðkapping | 1/2 marathon |
| **Bronsa:** | Heri Ziska | Klingruvarp |
| | Ingibjørg Poulsen | Kúluvarp |
| | Sunnuvá Bjarnastein | 5.000 m |

